# Signar revsar síni egnu



*- Aðalstjórn, leiðsla, politikarar og tjóðveldisfólk sum heild áttu ikki at funnið seg í, at Høgni Hoydal og Torbjørn Jacobsen seta dagsskránna í flokkinum, sigur fyrrverandi tjóðveldisformaðurin Signar á Brúnni*

**- Ein heilur flokkur og eitt yvirornað politiskt endamál er druknað í einum stríðið millum tveir persónar, m.a. tí aðalstjórn floksins ikki hevur verið vakin og røkt sína skyldu, sigur fyrrverandi formaður Tjóðveldisfloksins, Signar á Brúnni**

EYKAFLOKSTING
*Heini í Skorini*
*Heini_skorini@yahoo.com*

Saman við stórum parti av Føroya fólki eygleiðir Signar á Brúnni í hesum døgum turbulentu gongdina í umstríddu Tjóðveldisflokkinum. Og fyrrverandi floksformaðurin er alt annað enn nøgdur við stýring og leiðslu í sínum egna flokki.

### Aðalstjórnin svikið

Fyrrverandi formaðurin og royndi politikarin metir, at um Tjóðveldisflokkurin hevði havt eina virkna og professionella aðalstjórn, hevði stríðið millum Torbjørn Jacobsen og Høgna Hoydal ongantíð komið so langt, sum tað í dag er komið.

- Aðalstjórnin skuldi verið virknari og komið inn í málið nógv fyrr, og samstundis skuldi hon syrgt fyri, at konfliktin millum Høgna og Torbjørn ikki gjørdist so ógvuslig og fekk so stóra ávirkan, sigur Signar á Brúnni. Hann heldur, at ein meiri vakin og framsíggin aðalstjórn hevði loyst trupulleikan á ein skilabetri hátt.

- Gongdin í flokkinum kemur á ongan hátt óvart á meg, og tí skilji eg ikki, at stjórnin og leiðslan sum heild ikki hevur sett forðandi tiltøk í verk fyrr í prosessini. Í staðin er flokkurin í dag komin so langt út á eitt síðuspor, at nýggjar bindandi reglur hava um vikuskiftið verið neyðugar at samtykkja á eykaflokstingi Tjóðveldisfloksins, sigur Signar á Brúnni.

Hann heldur, at slíkar skrivligar reglur um atburð høvdu verið óneyðugar, um leiðsla hevði borið seg rætt at frá byrjan, men tá stríðið er vorðið so stórt, er tað møguliga í dag vorðið neyðugt at áseta karmar og spælireglur. Men hvussu kann ein leiðsla og ein aðalstjórn verja seg fyri tí, Torbjørn Jacobsen hevur borðreitt við?

- Eg havi t.d. fyri langari tíð síðani boða avvarðandi frá, at hesir trupulleikar fyrr ella seinni fóru at koma. Tað hevur ikki verið torført at spáa um, hvussu gongdin í flokkinum fór at vera, um einki varð gjørt, og hetta havi eg sagt við leiðslu og Høgna Hoydal sjálvan, langt áðrenn núverandi stíð tók seg upp millum Torbjørn Jacobsen og floksformannin, sigur Signar. Spurdur, hvussu hann kann hava verið so vissur í, at slíkir trupulleikar vóru á veg, er Signar greiður.

- Persónssamansetingin í flokkinum hevur m.a. verið ein vandi, og í dagliga arbeiðinum hevur hædd ikki verið tikin fyri hesum og øðrum vandum. Ov lítið hevur verið gjørt fyri at skapa harmoni og semjur. Úrslitið er, at vit í dag sita við eini flokssamtykt, sum bindur politikarar og skerjir frælsið hjá politisku aktørunum í Tjóðveldisflokkinum. Tjóðveldisfólk hava nú orsøk at óttast og hugsa seg fleiri ferðir um, áðrenn persónligar áskoðanir verða bornar fram, og hetta kann vera ósunt og skaðiligt, sigur fyrrverandi formaðurin.

### Horvin politikkur

Signar á Brúnni metir tað vera stak óheppið, at persónsmál heldur enn politisk mál eftirhondini seta dagsskránna í Tjóðveldisflokkinum.

- Aðalstjórn, leiðsla, politikarar og tjóðveldisfólk sum heild áttu ikki at funnið seg í, at Høgni Hoydal og Torbjørn Jacobsen seta dagsskránna í flokkinum, og at persónar sum heild eru vorðnir tað primera fram um politikk. Ein heilur flokkur við eini politiskari visión er horvin orsakað av einum persónsstríðið, og hetta er ein ábending um, at onkustaðni er stýringin í flokkinum ikki, sum hon eigur at vera, finnist Signar at sínum egna flokki.

### Eysturoyingar avgerandi

Signar á Brúnni er varin við at úttala seg um framtíðina hjá Torbirni Jacobsen í Tjóðveldisflokkinum, men hann leggur dent á, at eksklusiónir altíð hava negativar avleiðingar á ein ella annan hátt. Eitt fólkatingsval stendur fyri durum, og Signar dugir ikki at spáa, um Høgni og Tobbi vera á sama lista.

- Eg meti, at Eysturoyar Tjóðveldisfelag verður avgerandi fyri framtíðina hjá Torbirni Jacobsen. Higartil hava eysturoyingar stuðla Høgna í hesum máli, og tað er møguliga ein ábending um framtíðina hjá Tobba, men sum heild er torført at spáa um framtíðina, sigur fyrrverandi tjóðveldishøvdingurin at enda.

in hjá Tjóðveldisflokkinum er áður komin til ta niðurstøðu, at Tórbjørn Jacobsen eigur at vera settur út um tingbólkin, tí hann fór út um mark, tá hann legði eftir formanninum í tveimum lesarabrøvum í oktober mánaði.

*Hevur tú nakran stuðul í tingmanningini?*

Tað veit eg ikki, eg havi ikki tosað við nakran eftir flokstingið. Satt at siga áni eg ikki, hvørja støðu tingmanningin tekur í mun til niðurstøðuna hjá aðalstjórnini, er stutta viðmerkingin hjá Tórbjørn Jacobsen.

### Framtíðin

Tórbjørn Jacobsen ætlar ikki at fella í fátt, hóast hann møguliga verður settur út um tingbólkin. Hann slær fast, at velur tingmanningin endaliga at seta hann uttanfyri, fer hann kortini at reka tjóðveldispolitikk í løgtinginum.

- Eg havi verið tjóðveldismaður síðan eg var tannáringur. Hóast eg møguliga ikki verður partur av tingmanningini fara eg at føra sama politikk, eg havi gjørt síðan eg gjørdist politikarihar verður eingin broyting. Eg gjørdist limur í Tjóðveldisflokkinum fyri 30 árum síðan, og eg havi framvegis somu hugsjónir, sigur Tórbjørn Jacobsen.

Í Danmark verður dúgliga gitt, at Fólkatingsval verður í komandi mánað. Spurdur, um hann ætlar at gera eina roynd at stilla upp fyri Tjóðveldisflokkin á komandi Fólkatingsvali, svarar hann:

- Hatta taki eg ikki støðu til, fyrr enn tingmanningin hevur tikið støðu. Eg meti meg sum part av flokkinum, tí eg eri framvegis limur í flokkinum, men tað er givið, at tá eykaflokstingið mælir til, at eg ikki skal fáa nakað álitisstarv í flokkinum, so verður tað torført at gerast valevni fyri flokkin, sigur Tórbjørn Jacobsen at enda.

## Høgni fær fullan stuðul

Í samband við eykaflokstingið hjá Tjóðveldisflokkinum leygardagin er soljóðandi yvirlýsing send fjølmiðlunum:

Eykaflokstingið veitir floksformanninum sín fulla stuðul.

Eykaflokstingið tekur avgjørda frástøðu frá framferðini hjá Tórbirni Jacobsen, løgtingsmanni.

Eykaflokstingið mælir tingmanningini til at boða løgtingsformanninum frá, at hon setur í verk samtykt sína, um at tingfólk, sum í fjølmiðlum fremur persónsálop á annað tingfólk, setur seg uttan fyri tingbólkin. Hetta ber í sær, at Tórbjørn Jacobsen verður settur uttan fyri tingbólkin og kann ikki umboða flokkin í nevndum ella øðrum álitissessum, tað ið eftir er av valskeiðinum.

Soleiðis samtykt á eykaflokstingi Tjóðveldisfloksins hin 18. desember 2004.

## Karsten er nýggjur næstformaður

Frá Eykaflokstingi Tjóðveldisfloksins leygardagin er sent soljóðandi tíðindaskriv:

Á eykaflokstingi í Tórshavn hin 18. desember 2004 hevur Tjóðveldisflokkurin m.a. viðgjørt hesi mál:

1. Karsten Hansen varð valdur næstfor-maður við 39 atkvøðum, meðan mótvalevnið Tórbjørn Jacobsen fekk 7 atkvøður.
2. Uppskotið frá starvsnevndini um at seta í verk útihýsingarreglur í Tjóðveldisflokkinum varð samtykt við 32 atkvøðum fyri og 14 ímóti.
3. Uppskotið frá starvsnevndini um at broyta reglurnar fyri innkalling til eykaflokstíng varð samtykt við 35 atkvøðum fyri og tveimum ímóti.
4. Flokstingið viðgjørdi støðuna í flokkinum og samtykti hjáløgdu yvirlýsing.